## U21 í Moskva

Týsdagin fór føroyska U21 landsliðið úr Føroyum við kós móti Russiska høvuðsstaðnum. Gist varð í Kastrup náttina til mikudagin og síðan gekk leiðin móti Moskva. Ferðin gekk væl og okkara menn komu til Iris Congress Hotel umleið klokkan 16 seinnapartin í fyrradagin. Eftir eina lítla máltíð varð stutt venjing á skránni. Í gjármorgunin vandu okkara menn á Khimki leikvøllinum, har dysturin eisini skal spælast. Landsdysturin móti Russum verður spældur leygardagin klokkan 16.00 lokala tíð, tað er klokkan 13.00 føroyska tíð.



## Cannavaro positivur

Italski landsliðsskiparin, Fabio Cannavaro, er testaður positivur í eini dopingroynd. Italskir miðlar skriva, at talan er um korison, sum er funnið í royndini. Juventus, har Cannavaro spælir í løtuni, sigur, at talan er ikki um doping, men at Cannavaro fekk viðgerð við evninum, eftir at hann varð stungin av ein býflugu. Undir øllum umstøðum hevði Cannavaro ikki spælt við móti Írlandi leygardagin. Hann er nevnliga leikbannaður.

# Eg hati heiðurlig tap

**So avgjørdur er Jónas Þór Næs, sum fegin vil avtaka hatta hugtakið. – Eitt gott úrslit er at vinna ella ein javnleikur. Eitt tap eri eg ongantíð nøgdur við, heldur ikki móti Fraklandi, sigur hann**



rolant@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam



Jónas Þór Næs heldur enn fegin endurvinna plássið sum høgri bakk og prógva, at tað er hann nóg góður til

Mynd: Rólant Waag Dam

**Tréguier, Frankaríki:** – Eg orki ikki fyri hasum spurninginum. Eitt gott úrslit er at vinna ein dyst ella ein javnleikur viðhvørt. Nú er mótstøðuliðið Frakland, men eg eri ongantíð nøgdur við eitt tap. Heldur ikki í móti teimum, svarar Jónas Þór Næs, tá hann verður spurdur, hvat eitt gott úrslit fyri Føroyar hevði verið leygarkvøldið.

Spurdur beinleiðis, um hann ikki hevði góðtikið enn eitt heiðurligt tap, er svarið ógvuliga greitt.

– Eg hati heiðurlig tap!

### Tað ber til

Jónas Þór Næs metir, at dysturin móti Litava prógvar, at vit kunnu fáa betur úrslit enn so ofta áður.

– Hetta gevur absolutt blóð á tonna. Vit hava fýra stig, og tað er meira enn nakað annað lið, sum liggur aftast hevur í hesi undankappingini. At vit fáa trý stig í móti einum liði, sum liggur meiri enn 100 stig omanfyri okkum á ratingstiganum sigur eisini, at tað ber til, sigur Jónas Þór Næs.

Hann heldur somuleiðis, at liðið er í støðugari menning.

– Og tað er eitt sunt tekin, at tað ikki bara er Rógvi Jacobsen, sum skorar okkara mál, sigur Jónas Þór Næs.

### Frá bonkinum til bakkin

Sjálvur hevur hann verið nógv róstur fyri avrik síni sum høgri bakkur. Níggju landsdystir er tað blivið til. Burtursæð frá einum leikbanni hevur hann spælt allar dystirnir á rað, men móti Litava varð hann settur á bonkin.

– Venjarin ger altíð tað, hann metir vera best fyri liðið. Tað gjørdi hann eisini móti Litava, og tað vísti seg at rigga, sigur Jónas Þór Næs, sum tó var vónbrotin um, at hann ikki byrjaði inni.

– Sjálvandi var eg tað. Eg eri altíð vónbrotin, tá eg ikki byrji inni, tí tað er tað, eg vil. Eg vóni altíð at byrja inni, men vit hava eina sunna og góða kapping um plássi. Tað er bara gott, sigur Jónas Þór Næs, sum vil taka av møguleikanum, um hann fær hann.

– Tað var avgjørt meiningin at koma aftur á høgra bakk, og fái eg kjansin, vil eg fegin prógva, at eg eri nóg góður til tað, sigur Jónas Þór Næs.

# Úr Tjørnuvík til Tréguier

**Seinast Brian Olsen var við á eini uttanlandsferð hjá landsliðnum, slapp hann ikki upp í part. Tað vónar hann hesaferð**



rolant@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam

**Tréguier, Frankaríki:** Brian Olsen úr Tjørnuvík spældi sín fyrsta landsdyst, tá hann varð skiftur inn í dystinum í móti Litava. Harvið eru landsliðsroyndirnar ikki tær stóru, men hetta er kortini ikki fyrsta ferðin, Brian Olsen er við á eini landsliðsferð.

– Eg var við í Eysturríki. Tá slapp eg gott nokk ikki upp í part. Nú eru vit 22 leikarar, men fýra hava leikbann leygarkvøldið, so møguleikarnir eru har, sigur Brian Olsen.

Hann heldur ikki, at tað er nakar trupulleiki at seta seg upp til eina stóra uppgávu sum hesa, hóast heimliga landskappingin endaði fyri eini viku síðani.

– Avgjørt ikki. Vit skuldu jú verið í toppform nú, so eg vóni, at vit gera ein góðan figur leygarkvøldið, sigur Brian Olsen, sum annars letur væl at umstøðunum í Tréguier.

– Hetta er stuttligt. Býurin, vit búgva í er hugnaligur, fólkini eru fitt og tað er stuttligt at vera partur av hesum hópinum, sigur Brian Olsen, sum er komin úr heimbygdini Tjørnuvík til Tréguier í Frankaríki.



Brian Olsen úr EB/Streymi er skrásettur fyri ein landsdyst

Mynd: Rólant Waag Dam